# Skráin fyri Rás2

## Týsdagur 10. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Eirikur Lindenskov leggur til rættis
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Eirikur Lindenskov leggur til rættis
09:05 Morgunroðin – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunroðin heldur fram – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir er vertur
15:00 Tíðindi
15:05 E-Drewið – Eyðfinn Drewsen leggur til rættis
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
21:00 Á Torginum – sending hjá EvR
22:30 Føroyar mítt land – Eirikur Lindenskov leggur til rættis
22:35 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land – Eirikur Lindenskov leggur til rættis
23:05 Tónleikur

## Mikudagur 11. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis
09:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
10:00 Lýsingar
10:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Seinnapartssending – Eyðun Klakkstein leggur til rættis
15:00 Tíðindi
15:05 Ynskiløtan
16:00 Tíðindi
16:05 Ynskiløtan
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Summartíð (e) – Eyðun Klakstein leggur til rættis
21:00 Úr skjáttuni – Prát við Torleif Johannesen og Ásu Jacobsen ísambandi við at sjómansmissiónin er 90 ár
22:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis
23:05 Morgunendursendingin (e)

RÁS ...títt radio

## Bilradio

### Týsdagin kl. 16.05

Vit tosa við Victor Carlsen frá Fa. Manus um umhvørvisvinarlig vaskievni til bilar, við Sølva Reinert Hansen frá Ferðslutrygd um sjálvvirkandi ferðkanningar og Helgi L. Petersen frá Tryggingarfelagnum Føroyar svarar tryggingarspurningum.

Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um at Toyota í fjør høvdu eitt yvirskot upp á 100 milliardir krónur og at russiski bilmarknaðurin verður tann størsti í Evropa í 2010.

## Úr Skjáttuni

### Mikukvøld kl. 21.00

Prát við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara, og Ásu Jacobsen, ið var við til at skipa fyri landsstevnuni fyri sjómanskvinnuringar.

Evnið fyri sendingina er: Sjómansmissiónin 90 ár. Frants Jensen leggur til rættis.

Rás2 mikumorgun 9-12
# Summartíð




## Rás2 skiftir til Summartíð

Í summar verður Summartíð á Rás2 mikumorgun millum klokkan 9 og 12. Á skránni verður lætt summartilfar, fólk vitja í studio, og vit fara á vitjan hjá fólki, góður tónleikur verður spældur – eisini live-tónleikur viðhvørt – og lurtararnir kunnu vinna spennandi vinningar. Vertir í Summartíð verður Eydna Skaale og Eyðun Klakstein.




## Vinn ferð til konsert við Bjørk

28. juni spæla Bjørk og Sigurrós stóra konsert undir opnum himni í Reykjavík. Konsertin er ókeypis, og endamálið við henni er at seta sjóneykuna á náttúruna. Atlantsflog fer at flúgva føroyingar til konsertina í Reykjavík, og mikumorgunin kanst tú vinna eina ferð til Reykjavíkar í sambandi við konsertina. Fyri at taka lut í kappingini, skalt tú senda eina grundgeving fyri, hví tú skalt hava ferðina. 5 tær bestu, stuttligastu ella mest uppfinnsomu grundgevingarnar verða við í lutakastinum um ferðina frá Atlantsflogi. Send tína grundgeving til 559999.

## Jens Marni live

Jens Marni Hansen vitjar í sendingini, og við sær hevur hann sín kassagittar. Hann fer at syngja nýggja hittið hjá sær, I Don't Wanna Wait Nomore, live í sendingini, og prátað verður við hann um nýggju útgávuna og um at hita upp fyri Bryan Adams. Vit geva eisini Jens Marna eina avbjóðing, og spurningurin er so, um hann vil taka við henni.

